# Fara nú at royna nýggja samferðsluhavn á Tvøroyri

**– Í næsta mánað verða royndir gjørdar fyri at vita, hvar tað er best at leggja nýggju samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

**Tvøroyri:** Fyrst í komandi mánað fara umboð fyri Tvøroyrar Býráð og Landsverkfrøðingin til Danmarkar.

Ørindini eru at gera royndir í einum hyli hjá Dansk Hydraulisk Institutt fyri at vita, hvar á Trongisvágsfirði tað er best at leggja eina nýggja samferðsluhavn.

Nú nýggj suðuroyarferja skal setast í sigling í 2004, verður tað eisini neyðugt at gera nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði.

Tað verður landið, sum skal byggja og eiga nýggju samferðsluhavnina í Trongisvági og fyribils metir Landsverkfrøðingurin, at hon liggur best fyri ímillum húsið hjá Bilaeftirlitinum og Lítluholmar, ið eru nakað uttanfyri samferðsluhavnina á Drelnesi á syðra armi á Trongisvágsfirði.

Á Hydraulisk Institutt er modell gjørt av Trongisvágsfirði og royndirnar, sum skulu gerast fyrst í mai mánað, skulu vísa, akkurát, hvar á fjørðinum tann nýggja samferðsluhavnin liggur best.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað, sum dentur verður lagdur á, at havnin skal gerast so, at tað ber til hjá nýggja suðuroyarskipinum at leggja at, bæði eystur og vestur og norður og suður, alt eftir, hvussu ættin er.

Atløgubryggjan norður og suður verður bara eitt grótkast við stabbum á, sum hann kann leggja at.

Samstundis skulu royndirnar vísa, hvussu havnin fer at ávirka viðurskiftini á norðursiðuni.

Og nú modell kortini er gjørt av fjørðinum, er eisini ætlanin at royna, hvussu ein moli frá syðra landinum, út á fjørðin, fer at avirka viðurskiftini inni á fjørðinum.

Men borgarstjórin sigur, at ein slíkur moli verður ikki gjørdur nú, tí hann er eitt kommunalt mál burturav, sum liggur langt frammi í tíðini.

### Má byrja í vetur

Finnleif Guttesen sigur, at skal samferðsluhavnin verða liðug samstundis sum nýggja suðuroyarskipið, verður neyðugt at fara undir arbeiðið longu í vetur.

– Landsverkfrøðingirin metir, at tað verður neyðugt at bjóða arbeiðið út í heyst, so at farast kann undir tað fyri ársskiftið.

Enn er nógv ívamál eftir, sum ikki eru avgreitt, eitt nú, hvussu verður við farstøð á ferjuleguni og, hvaðani grótið til leguna skal koma.

Finnleif Guttesen sigur, at eitt, sum hevur verið frammi, er at sprongja tunnil inn í lendið, sum so kann brúkast til goymslurúm onkusvegna, sum í Fuglafirði, men tað allarbesta hevði sjálvsagt verið at tengt arbeiðið saman við einum tunli ímillum Øravík og Hov.

Men borgarstjórin vísir á, at á landsins fíggjarætlan fyri í ár er onki sett av til arbeiðið, uttan 2,6 milliónir til modellroyndirnar og aðrar fyrireikingar.

– Tí verður neyðugt við eini eykajáttan í ár til arbeiðið, sigur hann

Landsverkfrøðingurin hevur mett, at nýggja samferðsluhavnin fer at kosta 50-75 milliónir.



*Enn er endalig avgerð ikki tikin um, hvar nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri skal gerast og enn eru ongin peningur settur av. Men skal havnin verða liðug, tá ið nýggja suðuroyoyarskipið verður liðugt, verður neyðugt at fara undir arbeiðið longu í ár*

# Norðoyingar sleppa aftur at svimja

**Ein av fyrstu døgunum sleppa norðoyingar endiliga aftur at svimja, nú svimjihøllin letur upp aftur**

SVIMJIHØLL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ætlanin er, at svimjihøllin skal lata upp antin komandi leygardag ella týsdag.

Síðan 1. august hevur svimjihøllin staðið fyri umfatandi broytingum bæði innan og uttan, og tískil hevur ikki borið til hjá klaksvíkingum og øðrum at tikið nakrar longdir í hyljunum.

### 1. byggistig

Umvælingarnar, sum eru farnar fram, eru partur av fyrsta byggistignum av trimum, sum svimjihøllin skal ígjøgnum.

1. byggistig varð gjørt fyri at skapa nýggjar karmar um framtíðarsvimjihøllina, sum væntandi fer at standa liðug um nøkur ár.

Í hesi framtíðar svimjihøll fara norðoyingar at kunna njóta eitt heittvatnsumhvørvi við gosbaði, eitt cafeteria og ein 45 metur langan skreiðibana, umframt at eitt nýtt teknik-rúm eisini verður gjørt í kjallaranum.

### Nýggja lyftu

1. byggistig hevur umfatað broytingar bæði innan og uttan. Nógv er gjørt uttandura við svimjihøllina, og innan er eitt nýtt skiftingarrúm gjørt til menningar- og rørslutarnaði, umframt at ein lyft er sett upp til tey rørslutarnaði at nýta.

Hendan lyft kann bera tey rørslutarnaði allan vegin til sjálvan svimjihylin, og hevur svimjihøllin leingi havt tørv á eini slíkari.

Harafturat er nærum alt gjørt av nýggjum innan, og eitt nýtt ljóðannlegg er eisini sett upp.

Hetta hevur alt ført við sær, at svimjihøllin nú sýnist at vera nógv ljósari og frískari, enn hon var áðrenn umvælingarnar.

Umvælingarnar innan eru nú komnar so væl ávegis, at svimjihøllin kann lata upp aftur. Enn er ikki alt liðugt uttandura, men arbeitt verður framvegis við hesum, hóast almenningurin nú aftur kann gera nýtslu av nýmótans umhvørvinum innan.



*Teir rokast óført við at leggja seinastu hond á umvælingarnar*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 19. apríl til hósdagin 26. apríl**

## Valfundir kring landið




Sjónvarpið verður við á trimum valfundum kring landið seinastu vikuna uppundir valið. Valfeløgini skipa fyri fundunum og teir eru almennir. Ætlanin er at geva áhoyrarunum rúmar møguleikar at blanda seg í kjakið. At hava viðmerkingar og seta spurningar. Fundirnir verða skipaðir sum al-mennir pallborðsfundir. Hvør flokkur hevur trý umboð við á fundunum.

Valfundirnir verða sendir beinleiðis í sjónvarpinum

Fundirnir verða klokkan 20.25 eftir hesi ætlan:

Mánakvøldið 22. apríl í Roynhøllini í Hvalba

Mikukvøldið 24. apríl í ítróttarhøllini í Klaksvík

Fríggjadagin 26. apríl í ítróttarhøllini á Kambsdali í Eysturoy.

Sjónvarpsvertir verða Øssur Winthereig og Tórður Mikkelsen.

## Nú tað stundar til val...

*Lydia Didriksen ummælir:*



So byrjar endaspurturin! Í longri tíð hava dagbløðini verið á tremur við valgreinum, og nú fylgja loftmiðlarnir tropp. Fyrsta sendingin Tinggáttin var send mánakvøldið, og tá var tað Sjálvstýrisflokkurin, sum skuldi kunna um síni sjónarmið. Byrjanin av sendingini var ein ferð við floksformanninum, Eyðuni Eltør. Hvat, ið hann segði? Spyr ikki meg! Eg sat burturi í øðrum heimi og hugdi eftir myndunum aftan fyri formannin, sum minti meg um løgin gandakend glansbíløt.

Aftaná var Sámal Petur í Grund spurdur um ymisk viðurskifti av tveimum sjónvarpsvertum. Um nakað nýtt kom fram? Nei, eg helt, at tað var rættiliga keðiligt at hyggja og lurta eftir. Týskvøldið var tað so Miðflokkurin. Formaðurin byrjaði við at greiða frá grundsjónarmiðunum hjá flokkinum. Eisini spurdi hann tveir aðrar menn, sum eru uppstillaðir, um teirra áskoðan. Eftir hetta var formaðurin spurdur í góðar 25 minuttir um valskrá og stevnuskrá. Um nakað nýtt kom fram? Nei, men henda sendingin var ikki so keðiligt at lurta eftir sum tann fyrra! Kanska eru Jenis og hansara sjónarmið meiri áhugaverd!

Eitt var tó felags fyri báðar sendingarnar: Bara menn umboðaðu flokkarnar! Hvar vóru konufólkini? Hví sleppa tær ikki framat í sjónvarpinum? Sjónvarpið er ein sera týdningarmikil miðil og er sera vælegnaður at føra seg fram í, so her kundu konufólkini rættiliga sloppið at gjørt vart við. Tað hevði helst hjálpt, um sjónvarpsvertirnir kravdu, at bæði kynini vóru umboðað í slíkum sendingum!

Sunnudagin seinnapartin var ein rættiliga áhugaverd og skelkandi sending um kristin samkynd og kirkjuna. Sendingin bygdi á dagbóksbrot hjá ungum kristnum norskum manni, sum ikki megnaði at liva við, at hann var samkyndur. Hann orkaði ikki at liva við lygnini og kláraði ikki at koma til sættis við sannleikanum. Sendingin lýsti støðuna hjá kirkjuni í Norðurlondum til tey samkyndu, og hvussu torført tað er hjá kristnum samkyndum at finna og sættast við egnan samleika.

Onnur áhugaverd sending í Svf var mánakvøldið. Hon snúði seg um, tá ið børn missa. Í hesi sendingini greiddi ein lærarinna frá, hvussu hon hevði roynt at lætt um gerandisdagin hjá trimum børnum í sínum flokki, sum høvdu mist systkin og foreldur.

Ein áhugaverdur spurningur, sum kom fram í sendingini, var, hvar markið gongur millum tað heimliga og skúlan. Var tað rætt av lærarinnuni at tosa um sorgina og missin hjá hesum trimum børnunum í teirra flokki? Sjálv ivaðist hon viðhvørt, tá ið hon kendi seg ovbyrjaða, og fleiri starvsfelagar hildu, at skúlin átti ikki at blanda seg. Lærarinnan fekk royndar sorgráðgevar at hjálpa sær, og tá ið saman um kom, vóru bæði foreldur og næmingar sera takksamir fyri arbeiðið, sum henda lærarinnan stóð fyri. Eftir hetta fekk skúlin eina skipaða ætlan, hvussu farast skal fram, tá ið sorg rakar næmingar.

Tunnlig vika, men okkurt var so!

## Stýrivolt




## Fres – matpakkar




## Kina syndromet

